Sosialurin



# 12 kvinnur valdar á ting seinastu 155 árini


Jona Henriksen 1978-80


Karin Kjølbro 1978-90


Jóngerð Purkhús 1988-90


Marita Petersen 1988-98


Lisbeth L. Petersen 1990-


Helena Dam á Neystabø 1990-2002


Maria Hansen 1994-98


Ingeborg Vinther 1994-98


Katrin Dahl Jakobsen 1998-2004


Annita á Fríðriksmørk 1998-


Kristina Háfoss 2002-04


Heidi Petersen 2004-

JAVNSTØÐA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Jona Henriksen var fyrsta kvinna, sum hevði fast sæti á tingi. Hon kom á ting sum varakvinna fyri Jákup Lindenskov, landsstýrismann, eftir løgtingsvalið í 1974.

Tó er Malla Samuelsen tann fyrsta kvinnan, sum hevur havt sæti á tingi, tá hon kom á ting í nakrar dagar fyri Marius Johannesen í 1964 - umboðandi Sjálvstýrisflokkin í Suðurstreymoyar valdømi.

Malla Samuelsen umboðaði eisini Sjálvstýrisflokkin í Tórshavnar Býráð frá 1956-60. Hon er fyrsta kvinnan, sum er vald í Tórshavnar býráð.



*Malla Samuelsen hevði sæti á tingi í nakrar dagar í 1964 - sum fyrsta kvinnan nakrantíð. Rúna Sivertsen hevði sæti á tingi fyri Anfinn Kallsberg frá 1996 til 2002*

Í 1978 vórðu tær fyrstu kvinnurnar valdar á ting. Tað var Jona Henriksen úr Javnaðarflokkinum og Karin Kjølbro úr Tjóðveldisflokkinum.

Í 1980 fall Jona Henriksen, meðan Karin Kjølbro varð afturvald - sum einasta kvinna á tingi. Í 1984 var Karin Kjølbro vald – meðan Jóngerð Purkhús gjørdist landsstýriskvinna í m. a. fíggjarmálum - hon er tann fyrsta kvinnan, sum hevur sitið í landsstýrinum.

Í 1988 vóru Jóngerð Purkhús og Karin Kjølbro valdar fyri Tjóðveldisflokkin og Marita Petersen fyri Javnaðarflokkin.

Í 1990 høvdu tríggir flokkar kvinnuliga umboðaðan. Marita Petersen fyri Javnaðarflokkin, Helena Dam á Neystabø fyri Sjálvstýrisflokkin og Lisbeth Petersen fyri Sambandsflokkin.

Í 1994 var Marita Petersen vald fyri Javnaðarflokkin, Helena Dam á Neystabø fyri Sjálvstýrisflokkin, Lisbeth Petersen og Maria Hansen fyri Sambandsflokkin og Ingeborg Vinther fyri Verkamannafylkingina

Rúna Sivertsen kom á ting sum varakvinna fyri Anfinn Kallsberg í 1996, tá hann fór í landsstýrið

Í 1998 vóru valdar Lisbeth L. Petersen fyri Sambandsflokkin, Katrin Dahl Jakobsen fyri Javnaðarflokkin, Helena Dam á Neystabø fyri Sjálvstýrisflokkin og Annita á Fríðriksmørk fyri Tjóð-veldisflokkin.

Rúna Sivertsen hevði sæti sum varakvinna fyri Anfinn Kallsberg.

Í 2002 vóru valdar Lisbeth L. Petersen, Katrin Dahl Jakobsen, Annita á Fríðriksmørk og Kristina Háfoss fyri Tjóðveldisflokkin.

Við seinasta løgtingsval í 2004 vóru tríggjar kvinnur valdar á ting:

Lisbeth L. Petersen
Annita á Fríðriksmørk
Heidi Petersen.

**Kvinnur, valdar á ting:**

Jona Henriksen 1978-80
Karin Kjølbro 1978-90
Jóngerð Purkhús 1988-90
Marita Petersen 1988-98
Lisbeth L. Petersen 1990-
Helena Dam á Neystabø 1990-2002
Maria Hansen 1994-98
Ingeborg Vinther 1994-98
Katrin Dahl Jakobsen 1998-2004
Annita á Fríðriksmørk 1998-
Kristina Háfoss 2002-04
Heidi Petersen 2004-

# Kvinnudagurin byrjaði í umstríddum ungdómshúsi

**Tað var ein týsk kvinna, sum í 1910 á eini altjóða, sosialistiskari ráðstevnu í Keypmannahavn tók stig til altjóða kvinnudagin 8. mars. Hendan ráðstevnan varð hildin í nógv umstrídda og júst niðurtikna ungdómshúsinum á Jagtvej 69 í danska høvuðstaðnum**

JAVNRÆTTINDI

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Søgan um altjóða kvinnudagin byrjar í Keypmannahavn í 1910 og er sostatt 98 ára gomul. Tað var týski feministurin og sosialisturin, Clara Zetkin, sum á eini altjóða, sosialistiskari ráðstevnu í danska høvuðsstaðnum tók stig til at skipa fyri einum kvinnudegi. Ráðstevnan var hildin í tí nógv umstrídda og júst niðurtikna ungdómshúsinum á Jagtvej 69.

Dagurin 8. mars varð valdur, og fyrsta haldið av altjóða kvinnudegnum varð hildið í 1911, tá Eysturríki, Sveits, Týskland og Danmark gjørdu av at hátíðarhalda dagin. Longu árið eftir komu Svøríki, Frankaríki og Holland við, og í 1913 Rusland og Tjekkoslovakia.

Altjóða kvinnudagurin hevur havt stóran týdning í bæði Týsklandi og Danmark í síðstu øld. Men hvussu dagurin varð hildin, var nógv ávirkað av í hvørji politiskari støðu og hvør tíðarandi var galdandi í landinum. Her finnast bæði felagseyðkenni, men eisini stórur munur.

Í Týsklandi var kvinnudagurin frá byrjan av eitt tiltak, sum tær sosialistisku kvinnurørslurnar, serliga innan Javnarðarflokkin, tóku stig til. Longu fyrsta árið fekk kvinudagurin stórt gjøgnumbrot við 40 ymiskum tiltøkum og heili 45.000 luttakarum bara í Berlin.

Undir fyrra veraldarbardaga kom stígur í, og upp ígjøgnum 20'ini var kvinnudagurin merktur av vánaligum, fíggjarligum korum í týska samfelagnum. Frá 1930 var tað bardagin móti fasismuni, ið savnaði kvinnurnar, og í 1933 gav Hitler forboð at halda kvinnudagin.

Í Vesturtýsklandi varð kvinnudagurin uppafturtikin aftan á seinna veraldarbardaga, og tá var høvuðsevnið friður. Í sekstiárunum var áhugin fyri 8. mars vorðin sera lítil, og ikki fyrr enn ein nýggj kvinnurørsla tók seg upp og setti kvinnudagin á skránna, fekk dagurin aftur týdning.

Í Eysturtýsklandi var høvuðslæran tann, at sosialisman og harvið javnrættindi vóru framd við grundlegging av einum sosialistiskum stati. Tí varð hildið, at tað ikki var brúk fyri einum kvinnustríðsdegi, og kvinnudagurin her gjørdist bert ein veitsludagur uttan hvørki kvinnustríð ella politiskt innihald. Í áttatiárunum tóku kvinnurnar í DDR seg saman og mótmæltu livikorunum í landinum.

Í nítiárunum hevur 8. mars í Týsklandi verið merktur av sameiningini og tættarti tilknýti millum eystur- og vesturtýskar kvinnurørslur. Eisini hevur vaksandi rasisman í samfelagnum verið eitt evni á kvinnudegnum.

Altjóða kvinnudagurin í Danmark hevur ikki havt somu slagkraftina, sum í Týsklandi. Kortini varð dagurin altíð hildin, sjálvt um hann ikki altíð fall á 8. mars.

Í Danmark vóru tað smærri grasrótarørslur, sum tóku stig til tiltøk á kvinnudegnum, sjálvt um tað eisini har vóru ymsar sosialistiskar kvinnurørslur, ið hátíðarhaldu dagin. Frá øðrum veraldarbardaga og fram til sjeytiárini var eitt stilt tíðarskeið, men líka sum í Týsklandi kom nýtt lív í kvinnudagin, tá tær nýggju kvinnurørslurnar tóku seg upp. Reyðsokkarørslan setti nýggj evni á dagsskránna,, sum dømis kropp og kynslív.

Í áttati- og nítiárunum fánaði sosialistiski boðskapurin, og síðani hevur altjóða kvinnudagurin broytt seg til ein hátíðardag, har kvinnur og kvinnurørslur við øllum møguligum politiskum sjónarmiðum sleppa framat.

Sjálvt um kvinnurørslur her á landi eru eldri, so var fyrsti veruligi, altjóða kvinnudagurin ikki hildin fyrr enn í 1984. Feløgini, ið stóðu aftanfyri, eru frá fyrst í fimtiárunum. Veturin 1975-76 varð tikið stig til Kvinnufylkingina, og í 1977 varð stóra kvinnukravgongan hildin undir heitinum: Saman eru vit sterkar. Kvinnufelagssamskipan Føroya varð stovnað í 1979.